gult cyan magenta svart

SVIMJUNG í Eysturskúlanum

Tilmelding	tlf. 317579 Mánakvold 18.50–20.20	Tina Jacobsen, Jákup av Skarði og Guðrun Jacobsen	Eysturskúlin
Tilmelding	tlf. 317579 Týsdag 15.30–17.00	Annika Holm og Guðrun Jacobsen	-
Tilmelding	tlf. 317579 Hósdag 18.15–19.45	Tóra Hansen og Annika Holm	-

ÍTRÓTT

Tilmelding	tlf. 317579 Mánadag 16.30–18.00	Tina Jacobsen, Dan Lamhauge, Johannis Joensen og Hans Hansen	Læraraskúlin
Tilmelding	tlf. 317579 Mánadag 18.00–19.30	Dan Lamhauge og Ingolvur Gunnarson	-
Tilmelding	tlf. 317579 Týsdag 16.30–18.00	Rakul Joensen, Mariann Øster, Johan Stenberg og Hans Hansen	Læraraskúlin

FRÆLS ÍTRÓTT

Tilmelding	tlf. 317579 Hósdag 16.30–18.00	Rakul Joensen og Hans Hansen	Læraraskúlin

DRAMA, RØRSLA OG TÓNLEIKUR

Tilmelding	tlf. 317755 Mánakvold 19.00–20.40	Rúni Gaardlykke og Sunrid Poulsen	Læraraskúlin

TÓNLEIKUR/SANGUR — byrjar 14. september

Tilmelding	tlf. 317755	**Barn yngri enn 14 ár**	
	Hósdag 14.00–15.40	Annika Højgaard	Skansastova
	Eldri enn 14 ár		
	Hósdag 16.00–17.40	Brandur Øssursson og Sámal Andrias Weihe	-

SANGUR OG TÓNLEIKUR

KAMARKÓR

Tilmelding	tlf. 312043 Mikukvold 19.30–22.05	Hans Pauli Törgard	Kommunuskúlin
	tlf. 221638		

KÓRSANGUR - Glymur - mest rútm.

Tilmelding	tlf. 310764 Mikukvold 19.00–21.40	Bjarni Berg	Læraraskúlin

KÓRSANGUR - Havnarkórið

Tilmelding	tlf. 311819 Hóskvold 19.30–22.30	Óavur Hátún	Sankta Frans Skúli

KÓRSANGUR — Fyri øll

Tilmelding	tlf. 311819 Mikukvold 19.00–20.40	Óavur Hátún	Sankta Frans Skúli

SANGUR

Tilmelding	frá kl.18 Hóskvold 19.00–21.35	Óavur Jokladal	Frúutrød

UNGDÓMSKÓR

Tilmelding	frá kl.18 Mikudag 16.00–18.35	Óavur Jokladal	Frúutrød

BØRN LÆRA AT SYNGJA — byrjað verður 11. september

3.–6. flokk

Tilmelding	tlf. 310736 Mánadag 13.00–16.30	Sigrið Sivertsen	Skansatova
	Týsdag 13.00–16.30	-	-
	Mikudag 13.00–16.30	-	-

KLAVER

Tilmelding	tlf. 312585 Mánakvold 16.00–18.35	Beinta Háberg Jacobsen	Kommunuskúlin st. 102
	tlf. 220190 Týskvold 16.00–18.35	-	-
Tilmelding	tlf. 312043 **KLAVER á byrjarnarstøði**	Hans Pauli Torgard	Læraraskúlin
	tlf. 221638		

KLAVER OG KEYBOARD Rock og jass

Tilmelding	tlf. 210663 Týs, mik og hósdag	Magnus Johannessen	Skansastova

TEORI Rock og jass

Tilmelding	tlf. 210663 Mikudag	Magnus Johannessen	Skansastova

SLAGVERK

Tilmelding	tlf. 210663 Víðkad skeið	Kaj Johannesen	Skansastova

ORKESTURSPÆL

Tilmelding	tlf. 321343	Eitt gott stað verður lagt undir orkesturspæl. Lættur klassiskur tónleikur og poppur (James Last stílur)	
	Hóskvold 19.00–21.35	Nikos Kapnas	Frúutrød 1

SAMANSPÆL

Tilmelding	tlf. 210663 Vegleiðing fyri rúmuðlkar	Kaj Johannesen	Skansastova

SLAGVERK

Tilmelding	tlf. 210663 Percussion og/ella trummusett	Kaj Johannesen	Skansastova

SLAGVERK

Tilmelding	tlf. 210663 Víðkad skeið	Kaj Johannesen	Skansastova

ORKESTURSPÆL

Tilmelding	tlf. 321343	Eitt gott stað verður lagt undir orkesturspæl. Lættur klassiskur tónleikur og poppur (James Last stílur)	
	Hóskvold 19.00–21.35	Nikos Kapnas	Frúutrød 1

Frítíðarvirksemi – børn og ung

UNG LIST HEINESENS HÚS

Fyri børn frá 4. flokki til 14 ár

Tilmelding	tlf. 322025 Mánadag 15.00–18.00	Gudrun Olsen	Heinesens hús
	Friggjadag 15.00–18.00	-	-
Tilmelding	tlf. 317755 Mikudag 15.00–18.00	Ditte Joensen	-
	Hósdag 15.00–18.00	-	-

Fyri 14 ár og eldri

Tilmelding	tlf. 319737 Týsdag 16.00–18.30	Astrid McDonald	Heinesens hús
	Týskvold 18.45–21.15	-	-

MARGARINFABRIKKIN

MATGERÐ

Tilmelding	tlf. 312217 Mánadag 15.00–17.00		Margarinfabrikkin

GITTAR

Tilmelding	tlf. 312217 Mikudag 13.00–18.00	Karl Anton Klein	Margarinfabrikkin

TEKNING

Tilmelding	tlf. 312217 Mikudag 15.00–17.00	Gudrun Olsen	-

SJÓNLEIKARASKÚLI - Byrjar 2. oktober

Fyri børn og ung 7 til 13 ár

Byrjanarflokkur

Tilmelding	frá kl. 8. - 16 Mánadag 15.00–17.00	Hedvig Vesterlund	Sjónleikarahúsið
	tlf. 311132 **Royndir nærningar**		
	Hósdag 15.00–17.00	-	-

BRIDGE SKÚLI

Tilmelding	tlf. 313697 Mánakvold 19.00–21.35	Mortan Rasmussen	Bridgehúsið

FÓLKADANSUR 4., 5., 6. OG 7. FLOKKUR

Tilmelding	tlf. 317755 Friggjakv. 18.00–19.00	Sharon Weiss og Hilmar Joensen	Studentaskúlin í Hoydølum

Um tú saknar onkra lærugrein ella hevur eitt brek, ið ger tað torført at luttaka, so ring ella skriva til skúlan.

Telefontíðirnar eru hesar:
Mánadag til hósdag kl. 09.00–12.00 og 13.00–20.00
Friggjadag kl. 09.00–12.00 og 13.00–18.00

Telefon 31 77 55 – telefaks 31 82 50

Skúlin byrjar mánadagin 25. september 2000

Næmingagjøld:
Almenn frítíðarundirvísing 300 kr + 400 kr ferðir tímatalið.
Maritimt fyrireikingarskeið kostar 1200 kr.
Dugnaskaparroynd í sigling og motorlæru kostar 600 kr.
Onnur royndarfyrireikandi undirvísing kostar 300 kr fyri hvørja lærugrein.
Frítíðarvirksemi kostar 100 kr.
Menningartarnað gjalda einaferð 300 kr.

Neyðugt er at melda til sum skjótast.

Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli og Tórshavnar Listaskúli

ítróttur
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

Dómarin hevur endaliga orðið

Dómsnevndin hjá Fótbóltssambandinum staðfestir, at dómaraavgerðir í fótbóltsdystum eru endaligar, hóast talan er um feildøming



Dómsnevndin hjá FSF sigur seg ikki hava heimild at broyta avgerðina hjá einum fótbóltsdómara, men Páll Nielsen, formaður í dómsnevndini vil tó ikki taka støðu til, um hetta kundi verið gjørt í øðrum føroum

EYÐUN KLAKSTEIN

Mikukvøldið bríkslaði Dómsnevndin hjá Fótbóltssambandinum landskappingardystin millum B36 og B71 av – endaligt.

Dómsnevndin staðfesti, at hon hevur ikki heimild at broyta ein dóm hjá einum fótbóltsdómara. Hetta gjørdi dómsnevndin, hóast talan var um eitt dómaramistak, sum møguliga hevði ávirkan á úrsliti av einum dysti.

Umstrídda hendingin fór fram í landskappingardystinum millum bestu mansliðni hjá B36 og B71. Tá støðan var 2-2, sparkaði ein spælari hjá B71 ein B36'ara inni í B71-brotsteiginum. Dómarin gav B71-spælaranum reyða kortið, men dømdi ikki brotsspark, soleiðis sum fótbóltslógin sigur, at hann skal gera.

Sambært fótbóltslógini skal eitt brot sektast á tí staðnum, tað verður framt, og er hetta inn í brotsteiginum, sum tað var í dystinum millum B36 og B71, eigur dómurin at verða brotsspark.

Vísti kravinum aftur

B36 kærdi hesa hending til Kappingarnevndina hjá Fótbóltssambandinum, sum kom til ta niðurstøðu, at hon hevði ikki heimild til at broyta meting dómarans, og tí ikki kundi lata B36 fáa nýggjan dyst, soleiðis sum felagið kravdi at fáa.

B36 var ikki nøgt við hesa avgerð, og kærdi tí dómin inn fyri Dómsnevndina hjá FSF. Her varð málið viðgjørt mikukvøldið, og Dómsnevndin staðfesti dómin hjá Kappingarnevndini.

B36 vísti í kæruni á, at í Danmark var ein dystur spældur av nýggjum, tí eitt dómaramistak hevði beinleiðis ávirkan á úrslitið av einum dysti. Dómsnevndin heldur ikki, at hendingarnar í Danmark og tann í Gundadali kunnu samanberast.

Dómsnevndin heldur, at sjálvt um tað er ásett í altjóða fótbóls lógum, at brotsspark skal dømast í ávísum føroum, er tað avgerðin hjá dómaranum at taka støðu til slík mál. Tí metir Dómsnevndin ikki, at hon hevur heimild til at broyta dómin, og tí verður kravið frá B36 um nýggjan dyst afturvíst.

Greitt mistak

– Eg helt, at málið var klokkuklárt, tí talan er jú greitt um eina feildøming. Men nú mugu vit bara staðfesta, at dómaraavgerðin er endalig, sjálvt um tað er ein týðandi feilur, sigur Kristian á Neystabø, formaður í B36, í viðmerking til avgerðina hjá Dómsnevndini, sum er endalig.

– Nú taka flestu feløgini sínar heimadystir upp á video, og tí átti tað at verða møguleiki at gjørt nakað við tað, tá talan er um eitt greiðan og dokumenteraðan feil, sum hevur stóra ávirkan á úrslitið av einum dysti, sum tað var í okkara førði.

B36 átti eitt brotsspark, tá støðan var 2-2 í dystinum í móti B71, og liðið hevði tí havt ein góðan møguleika at leggja seg fram um, um brotssparkið varð dømt. Tað var tað ikki, og seinni í dystinum gjørdi B71 tvey mál og vann sostatt 4-2.

– Nú kunnu vit ikki gera meira enn at staðfesta, at Dómsnevndin hevur ikki heimild at rætta ein dómarafeil. Men vit ætla at viðgera dómin og kanska fara vit at viðvirka til, at tað framyvir verður gjørligt at broyta skeivar dómaraavgerðir í 1. deild, tá tað ber til at dokumentera feilin og at staðfesta, at hann hevði týdning fyri úrslitið av dystinum, sigur Kristian á Neystabø.

Annars sigur Kristian á Neystabø, at eftir hansara fatan hevur dómsnevndin hjá FSF ikki arbeitt eftir røttum leisti í málinum.

- Tann sakkunnleiki, sum vit hava ráðført okkum við, hevur vístá, at sambært fótbóltslógunum er einki ivamál. Dómarin skal døma brotsspark í slíkum føroum sambært grein 12 í fótbóltslógunum. Dómsnevndin sigur, at teir ikki kunnu broyta dómarans meting, men her er talan ikki um nakra meting. Var tað soleiðis, at orðið »kann« stóð ístaðin fyri »skal«, hevði grundgeving teirra hingið saman, men tað ger hon ikki, sigur Kristian á Neystabø.

At enda leggur formaðurin í B36 áherslu á, at hetta málið einki hevur við B71 at gera. – Vit ynskja ikki, at málið verður tengt at viðurskiftunum millum feløgini bæði, tí vit hava, og fara vónandi framhaldandi at hava, eitt gott samstarv við B71.

Í stuttari viðmerking til málið sigur Páll Nielsen, formaður í dómsnevndini, at dómsnevndin við hesum málinum ikki hevur givið dómaranum endaligt vald í øllum avgerðum.

- Vit hava bara tikið støðu til hetta konkreta málið, og her hava vit avgjørt, at dómarans avgerð er endalig, sigur Páll Nielsen. At enda vísir hann á, at um onnur mál av líknandi slag taka seg upp í framtíðini, verða hesi eisini avgjørd hvør sær, og ikki við útgangsstøði í hesum máli.

Rumenar inn á Strendur

StÍF hevur til komandi ár brynjað seg við trimum rumenskum leikarum. Tveimum kvinnum og einum mannfólki

JÁKUP MØRK

Tað man ikki vera nøkur loyna, at StÍF hevur havt stóra gleði av hondbóltsevnunum hjá leikandi venjaranum seinastu árini, Jónleif Sólsker.

Ofta verður tikið til, at tað er ikki meira enn næstbest, tá venjarin samstundis er leikari, men hetta tykist ikki vera stødan á Strondum. Í øllum føroum hevur leiðslan í felagnum gjørt av, at komandi ár skal venjarin vera spælandi hjá bæði monnum og kvinnum.

Ileana var fyrst

Søgan um rumensku leikararnar byrjaði eftir kappingarlok í vár. Ileana Manolescu, sum í fjør spældi við kvinnuliðinum hjá Neistanum, setti seg tá í samband við StÍF. Tingast varð nakað millum partarnar, og at enda var semja um, at Ileana komandið árið skal verða leikandi venjari hjá StÍF, umframt at hon eisini tekur sær av venjingini hjá øllum yngru kvinnuliðunum.

Harumframt hevur Ileana, meðan hon var heima í summarfrí, havt samband við aðrar rumenskar leikarar, og eisini her hevur úrslit spurst burturúr.

Í summar søkti StÍF Hondbóltssambandið um, at besta kvinnudeildin varð víðkað upp í átta lið. Sum kunnugt gekk hetta ikki, og formaðurin í StÍF. Andrass Danielsen, sigur eisini, at avgerðin hjá HSF er væl skiljandi. StÍF hevði tó fyrireikað seg til eina møguliga víðkan, og tí varð avtala gjørd við enn eina rumenska kvinnu, Alina Maria Olanu, um at eisini hon skal spæla við kvinnuliðnum komandi ár. Hóast HSF avgerðin gekk ímóti ynskinum frá StÍF, er henda avtala framvegis galdandi, og hevur kninnuliðið hjá StÍF sostatt tveir rumenskar leikarar komandi árið.

Einki er tí at ivast í, at sum stødan er í løtuni, er liðið greiður favorittur til at vinna dystin um uppflytan til bestu deildina.

Eisini hjá monnum

Áðrenn Ileana fór heim í summarfrí, varð eisini heitt á hana um at kanna møguleikarnar fyri einum spælandi venjara til mansdeildina, og eisini hetta hevur eydnast henni.

Komandi árið skal Costin Dumitrescu taka sær av besta mansliðnum, og eins og Ileana skal hann samstundis hava ábyrgdina av venjingini hjá øllum yngru mans- og dreingjaliðum.

Leikarahópurin, sum hann hevur afturat sær, er eitt sindur broyttur í mun til undanfarna ár. John Petersen fór í ár til Íslands at spæla fótbólt, men um vetturin hevur hann frí frá hesum, og so er spurningurin, um hann kortini fær spælt hondbólt við strandingum.

Sveinbjørn Poulsen verður allar helst ikki at síggja aftur í fremstu hondbóltsrøðini, eftir at hann í mong ár hevur verið StÍF ein hollur stuðul, og so er eisini ivasamt, hvussu verður við hondbóltinum hjá Paula Hansen, sum framvegis dregist við ein gamlan skaða í økslini.

Strandingar hava tó nógv ungt og evnaríkt fólk, og við væntaða styrkinum frá nýggja leikaranum, er einki at ivast í, at liðið eisini komandi kappingarárið fer at teljast millum tey fremstu í landinum.